gult cyan magenta svart



VIÐMERKINGAR

# Kortanei í mai

**Eilif Samuelsen**
*11-02-01*



Tey flestu munnu vera á einum máli um, at upprunaliga fullveldisætlanin hjá hesari samgonguni er kollsigld. Orsøkin er tann einfalda, at projektið hjá landsstýrismanninum í fullveldismálum um at sleppa at proklamera fullveldið beinanvegin, men lata fremjanina av fullveldinum bíða til einaferð í eini ókendari framtíð, var heilt einfalt ikki burðardygt. Fyri at bjarga snøklunum av tí stóra dreyminum hava teir verið noyddir at ganga ta eyðmýkjandi kanossagongdina at gera eitt uppskot til fólkaat kvøðuna, sum skal eitast at liggja innan fyri Heimastýriskarmarnar. Lágt má hann lúta, ið høsnarass skal kyssa.

Men fólkið veit, at eingin uttan Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin eru førir fyri at gera eina líkinda avtalu við donsku stjórnina, sum er innan fyri karmarnar av ríkisfelagsskapinum. At lata slíkt upp í hendurnar á Tjóðveldisflokkinum og Fólkaflokkinum er frammanundan dømt til at miseydnast, tí teir hava stikni til bæði heimastýrislóg og ríkisfelagsskap.

Fullveldisfólk hava hildið seg havt funnið út av nøkrum heilt ótrúliga genialum, nevniliga at danir ikki vilja av við Føroyar. Sjálvandi vilja teir ikki uttan svørðsslag av við nakað, sum hevur hoyrt upp í Danmarkar ríki í 600 ár. Tað gera teir heldur ikki til nakað dulsmál. Við sínari útmelding nú um dagarnar vildi danska stjórnin gera greitt, at velja føroyingar loysing við fólkaatkvøðuna, so hava teir tikið grundarlagið undir ríkisveitingini burtur, og hon verður avviklað eftir fýra árum. Sama áramál tekur tað helst at avvikla felagsskapin. Ríkisveitingin hongur saman við ríkisfelagsskapinum. Siga føroyingar ríkisfelagsskapin upp her og nú, so heldur ríkisveitingin uppat her og nú. Tað liggur eingin hóttan ella ræðan í hesum.Tað er logikkur og konsekvensur á byrjanarstigi.

Tann største parturin av Føroya fólki veit og viðurkennir, at føroyska samfelagið er ikki búgvið til at taka fullveldi. Tað veit landsstýrismaðurin í fullveldismálum og hansara samgongupartnarar eisini. Tí taka tey ikki fullveldið treytaleyst. Og tí eru tey eisini komin aftur sum av torvheiðum, tá ið tey hava verið niðri og bidda danir um at gjalda fyri, at tey kunnu kalla Føroyar fyri eitt fullveldisríki. Eingin tilkomin føroyingur er so naivur, at hann ikki skilir, hví danir nokta fyri slíkum.

Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hava eitt alternativ til tann utopiska fullveldisdreymin. Teir eru fúsir at gera tær stjórnarligu broytingarnar í viðurskiftunum Føroya og Danmarkar ímillum, sum gevur okkum rúmari ræsur fyri sjálvsavgerðarrætti, men sum væl at merkja tryggja føroyska fólkinum, at livilíkindini og virkismøguleikarnir framhaldandi gera hetta landið til eitt tað besta í heiminum at búgva í. Tí siga vit kortanei til landsstýrisuppskotið.

# Úrmælingar oman fyri hálsvølin!

**Jógvan Adolf Johannessen**



Tað var ikki sørt, at eg – fyrst í hesum mánaðinum – við áhuga setti meg at hyggja og lurta eftir hesum miklu stórmenskum, sum skuldu greiða okkum vanligu føroyingum frá, hvussu vit skuldu bera okkum at fyri at røkka teirra glæsiliga dreymi um føroyskt fullveldi.

Men hóast eg ikki hevði væntað stórvegis av nýggjum, so mátti eg kortini ásanna, at eg hevði ikki væntað so syndarliga lítið.

Hóast løgmaður á sín vanliga stillføra hátt – tí soleiðis kenni eg hann – royndi sítt besta, so var tað týðiligt at síggja, at tað var ein hart kroystur maður, sum bar fram hugsjónina um føroyskt fullveldi.

Eg undraðist eitt sindur, tí soleiðis kenni eg ikki løgmann. Men skjótt fekk eg sjón fyri søgn. – Og tá mátti eg ásanna, at tað í grundini als ikki var so løgið, at løgmaður sá so kroystur út, tí brádliga sást á skíggjanum kjarnin av heldur illbrýntum tjóðveldishetjum.

Sum kunnugt hevur tjóðveldisflokkurin tikið sær einarætt og roynt at billa fólki inn um tað sjáldsama frælsi, sum innan býr í teirra sjáldsomu hjørtum.

Men tíverri eru hasi hjørtuni annaðhvørt útbrend og vorðin øska, ella hevur ongatíð verið rúm fyri nøkrum veruligum mannafrælsi í teirra sjáldsomu hjørtum – tí har er í hvussu so er einki nú. Nei, har er ísakalt.

Vert var eisini at geva gætur eftir, at umframt frammøttu tjóðveldisumboðini vóru eingi umboð frá hinum báðum samgonguflokkunum, og tað skulu teir eiga tøkk fyri. So stendur kanska ikki so illa til – hóast alt!

Men tað var eisini annað, sum var áhugavert at síggja og hoyra. Høgrumegin – undir liðini á løgmanni – sat hon, sum umboðar hin sonevnda sjálvstýrisflokkin í føroyskum politikki, við einum skeivum brosi. Tó, tað var eisini eyðsýnt, at heldur ikki hon kendi seg væl – og fyrr var illa!

Tað má sanniliga vera ein herskin biti at svølgja, at hon skal hava leitt hin annars so hóvliga flokkin út á villar víddir, haðani tað ikki er vendandi aftur. Jú, sanniliga – mangt umskiftist á mansins ævi. Tað var veruliga eitt mistak, at javnaðarflokkurin blásti nýtt lív í nasargluggarnar á tí flokki, sum var steindeyður, tí lønin hevur verið syndarlig. Men nú siga veljarakanningar, at tað ikki býðir bøtur, og tað ger heldur einki, um hann hvørvur úr føroyskum politikki. Í núverandi løiki ger hann meiri skaða enn gagn.

Undir vinstru lið løgmans sat hin – í orðsins sanna týdningi – rótføroyski landsstýrismaðurin Høgni Hoydal følin og nábleikur og royndi at greiða frá hvussu vit vanligu føroyingar skuldu hava tað, tá vit náddu hansara gylta dreymi – føroyskum fullveldi.

Men vit, sum minnast eitt sindur longur aftur í tíðina, vita hvussu lítið hald hevur verið í teimum forsøgnum, sum eru komnar frá tí flokki, sum hann nú umboðar í landsstýrinum. Høvdu tær forsagnirnar verið fylgdar, hevði tað av sonnum verið ein glæsilig støða í hesum landi, sum vit eru nógv betri við enn tjóðveldisflokkurin sum við sínum fanatiska hatri mótvegis dønum, ið annars ber brá av einari ótamdari undirlutakenslu, eiga at halda okkum langt burtur frá.

Jú, sanniliga var hetta ein ógvuliga sigandi løta. Føroyingar fingu at vita frá hesum trimum, at vit høvdu havt avlop í landskassaroknskapinum hesi seinastu árini, men vit fingu eisini at vita, at hetta avlopið var lagt til viks fyri at fíggja tað komandi fullveldið.

Tað kann av sonnum sigast, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum situr – eins og hann eisini á sinni boðaði frá – ógvuliga tungt oman á landskassalokinum, tí ístaðin fyri at byggja landið út, har stórur tørvur er á, skal peningurin nýtast til at fíggja tað glæsiliga fullveldið, sum samgongan droymir um skal gerast veruleiki um eini tíggju ár.

Tá kemur í hvussu so er eingin nýggj útbygging í Føroyum.

Men einum nýtast vit ikki at ivast í, og tað er, at livifóturin fer at lækka munandi. Men tað leggja fullveldisfólkini helst einki í, tí tá ið á stendur eru mong av teimum, sum hóast løgnar kenslur mótvegis dønum, tey fyrstu sum leita sær til Danmarkar.

Men, tá ið vit hava kvett bondini, er tað ikki sjálvsagt, at danir vilja hýsa teimum.

Eg kann hóast alt umbera mong av teimum, sum nú geyla um fullveldi, tí tey vóru ikki til, tá ið fólkaatkvøðan fór fram í 1946. Men vit, sum minnast eitt sindur av tí levnaði, sum var um tað mundið, minnast eisini, at sagt varð at Føroyar taldust millum ríkastu lond í heiminum.

Glæstrimyndirnar vóru stásiligar, men tíbetur kom loysingin ikki í lag, tí tað høvdu av sonnum verið einar hugnaligar Føroyar um so hevði verið.

Tað var kortini ein úr fólkaflokkijnum, sum tóktist at ivast í hvussu rætt tað var at kvetta bondini við Danmørk, og tað var Tórstein Petersen sáli, sum var stjóri í Sjóvinnubankanum. Hann mælti føroyingum til at atkvøða nei.

Tað vardu bert fá ár, so vóru allar mió., sum teir loysingarsinnaðu høvdu reypað av, burtur sum døgg fyri sól – og í 1950 legðist hin áður so málreysti og eggjandi fólkaflokkurin seg at durva í føvninginum á sambandinum, og har lá hann í átta ár.

Úrslitið varð, at Føroyar komu í eina tílíka støðu, at eg havi ikki orð fyri tí. Einir 2500-3000 føroyingar royndu at fáa sær vinnu við íslendskum, norskum, týskum og bretskum fiskiførum ella á landi í Íslandi, tí í Føroyum fór tað mesta av knóranum. Men hetta tykjast núverandi loysingarhetjur at hava gloymt, tí tær hava jú eitt serligt slag av frælsi í teirra serligu hjørtum!

Men hetta, sum áður er nevnt, var ikki alt, tí sama samgongan steðgaði allari havna- og vegagerð, meðan hon sat við róðrið. Tá var ikki stórvegis gabb av tí áður so eggjandi fólkaflokkinum, tí tað hevði sanniliga verið ein eiggilig støða í Føroyum, um landið hevði fingið sjálvstýri í 1946!

Tað skal kortini sigast fleiri av teimum, sum róptu harðast um loysing í 1946 til rós, at teir seinni viðgingu, at teir vóru villleiddir av ávísum oddafiskum, og at tað aldri hevði komið teimum til hugs at gjørt tað aftur. Tøkk skulu teir hava fyri tað.

Og føroyingar eiga at vita, at tað er ikki einans í sermerktum tjóðveldishjørtum, at alskur til Føroyar – og alt tað góða sum føroyskt er – býr. Eg fari tí at heita á Føroya fólk um at vísa hesum breggjandi – í egnum hugaheimi – hetjum, at tær kunnu hava sínar brongladu hugsjónir fyri seg sjálvar!

Tað er jú so sera lætt at vera úrmælingur oman fyri hálsvølin!

Myndaframsýning

## Millum himmal og jørð

TÍÐINDASKRIV
*Norðurlandahúsið*

Í dag kl. 17.00 letur upp myndlistaframsýningin »Millum himmal og jørð« hjá Bodil Kaalund, Danmark.

Bodil Kaalund, fødd 1930 er málari, grafikari, tekstillistakvinna og rithøvundur. Hevur útbúgving frá Kunstakademinum í Keypmannahavn 1950-1954 og hevur eisini gingið á øðrum skúla/skúlum fyri málarar.

Hon hevur ferðast nógv og arbeitt bæði í Norðanlondum og í Europa, eins hon hevur fingið fleiri stipendium og legat.

Bodil Kaalund hevur havt nógvar framsýningar bæði í Danmark og aðrastaðni í Norðanlondum. Hon hevur málað fleiri altartalvur.



gult cyan magenta svart

VIÐMERKINGAR

# »Alt ella einki«-politikkurin ber ikki á mál!

**Birgir Mohr,**
*Sandi*



Fullveldissamgongan hevur skjótt sitið í Tinganesi í trý ár, men ikki er nakað fullveldi í eygsjón enn. Sjálvstýrissamgongan frá 60-unum yvirtók jólaheilsanirnar, fullveldissamgongan hevur einki yvirtikið. *Hvør man vera í desperatión nú?*

Áðrenn fullveldisfólkini fóru til Danmarkar og eftir tað spáddi andstøðan og onnur fólk við hvat fór at henda, og danskir politikarar søgdu frá, meðan samgonguleiðarar – einamest tann eini – og teirra ryggklapparar kravdu »alt ella einki«-politikkin framdan. Hvør fekk rætt? Andstøðuflokkarnir hava ikki broytt politikk, teir hava somu støðu, men samgonguleiðararnir vóru noyddir at broyta bæði støðu og framferðarhátt, tí úrslitið higartil er: EINKI. Tingformaður fólkafloksins segði tað so gott, teir sigldu á land tríggjar ferðir. Er samgongan nú við at sigla á land fyri fjórðu og seinastu ferð?

Og ger tað nakað út frá okkara sjónarmiði? Svarið er ja, tað ger tað, tí óhappini og skommin raka ikki bert samgongufólk, men alt Føroya fólk – eisini teir nógvu føroyingarnar í Danmark. Og hetta er óneyðugt, tí aðrir hóvligari og skilabetri vegir eru at ganga.

Spurningurin er so, um hetta, ið nú skal koma á borðið, er tann mest trygga, tann skilabesta, tann greiðasta útmeldingin, sum er yvireins við fólkastýrið, við demokratiið og norrøna siðvenju, harvið ein politikkur, sum stórur meiriluti av okkara føroyingum óttaleysir kunnu taka undir við?

Ryggklapparar, sum til dømis Zakarias Vang og Jógvan Sundstein fyri at nevna tveir kendar menn, teir eru als ikki eftirfarandi, aleina av teirri orsøk, at teir søgdu tað fyrra uppskotið vera tað einasta rætta og besta. Tað øvugta er nú prógvað.

Eru løgmaður og varaløgmaður meira trúverdigir nú enn fyrru ferð? Eg ivist. Eg haldi bæði løgmaður og landsstýriskvinnan hava latið seg og teirra flokkar draga av varaløgmanni til »alt ella einki«-politikkin hjá tjóðveldismonnum, sum er órealistiskur, ótryggur, provokerandi, men als ikki semjuøkjandi í hesum máli.

Vit noyðast at fyrihalda okkum til tað, sum danska stjórnin og fólkatingið bjóða okkum, ístaðin fyri bert at provokera Danmark. Og her er ótryggleikin beinanvegin til staðar, óansæð hvat løgmaður sigur, tí tveir partar verða um at broyta heimastýrislógina og avgera, hvat har kemur at standa. Hvussu verður, tá vit onga krónu fáa úr Danmark um fýra ár? Vit hava bestu búskaparligu umstøður nakrantíð í dag, men hava ikki ráð til neyðugu ábøtur á nærum øllum samfelagsøkjum, umframt stóran íløgutørv? Hvør skal gjalda írestandi?

Búskaparfrøðingar siga, at vit fáa stórar fíggjarligar avleiðingar av hesum politikki. Statsaut. grannskoðarar, magistarar og teirra líkar (tað liggur einki persónligt í til hesar nevndu), teir skulu nokk klára seg, men tann vanligi føroyingurin – løntakarin, palleba og marsanna, sum hava goldið gildið einaferð, tey fara aftur at gjalda í stóran mun. Tí eru fólk ótrygg, ørkymlað og ivasom!

Eg eri ikki samdur við Signari Heinesen í øllum, men vóni sum hann, at føroyingar atkvøða við skili og ikki »upp á tross« og tað verður eitt greitt svar, soleiðis at avgerðin kann geva eina varandi loysn á hesum málinum, men eg frykti fyri tað verður ikki so við tí ætlan, sum nú skal koma á borðið.

Og tað er ólukkuligt fyri Føroya fólk og fyri Føroya land, tí sum løgtingsmaðurin Jenis av Rana sigur tað, at nú eiga vit at fáa eina breiða semju og harvið eina varandi loysn á hesum stóra máli. Er ikki breið semja um hendan politikkin, so fara komandi løgting aftur at broyta og nýta harvið alla tíðina til hetta mál, so samfelagsmálini annars liggja í órøkt, sum vit kenna tað frá hesum valskeiðinum.

At selja almennar ognir verður løtuvinningur og mátti kenst onkrum politikara svárt, og ikki minni fyri nógvar føroyingar, tí helst endar alt á útlendskum hondum. Longur røkkur so tjóðarstoltleikin hjá summum politikarum ikki?

Eg veit ikki, um tað ber til at broyta uppskotið nú so mikið, at eisini andstøðan kann taka undir við tí – ella í hvussu er størri partur av andstøðuni? Antin ein broyting í landsstýrinum ella í løgtingsins uttanlandsnevnd? Ella er alt ov seint nú? Er álitið heilt burtur nú?

Tað mest ógreiða er málið um, hvat skal henda ár 2012. Takið tí alt tað burtur úr uppskotinum. Tað hava nógv her ilt við at skilja, og danir hava skilt hetta øðrvísi enn samgongufólkini. Eftir verða so orðingarnar um yvirtøkur og minkan av blokkinum eftir at telvast um, ja og kanska áramálið, sum átti at verið minst 15 ár.

Tað ringasta er ein støða, sum deilir okkum føroyingar í tveir umleið líka stórar partar. Semja er møgulig, semja hevði verið verdug. Semja hevði givið okkum styrkið.

»Alt ella einki«-politikkurin er skeivur í slíkum stórmáli, har tað er framtíðarstøða Føroya og lívsvirði føroyinga telvað verður um. Bert ein avgerð við stórum meiriluta av Føroya fólki – 2/3 – 3/4 – er eitt nøktandi úrslit til slíkar avgerðir.

Sum tað sær út í løtuni, so koma vit í eina ólukkuliga støðu, sum ikki ber framyvir, men verður broytt aftur av skiftandi meirilutum á løgtingi. Álvaratos, tað kann ikki vera meiningin, tað er óverdugt.

# Viðmerking til villleiðandi viðmerking frá løgfrøðingi

**Sofus Strøm, Finn Thomsen, Súsanna Bertholdsen, Jónsvein Hovgaard, Alvi Mortensen, Jacobina Thorsteinsson**

Fyri stuttum royndi Jørgin Niclasen at billa fólki inn, at MRCC-støðin, sum *allir* aðrir stovnar, *bert* kundi vera í Havn. Men tíbetur slapp hann ikki so lætt, við tað at serkønur á økinum mótprógvaði hesum.

Í síðstu viku segði Halgir Winther Poulsen, advokatur, í viðtalu við Sosialin, at hann ikki kendi til, at partar av einum landi tóku loysing frá einum øðrum og helt, at hetta ikki bar til. Halgir er sum flestu politikararnir. Hann sleingir um seg við orðum setningum, sum bert hava til endamáls at villleiða fólk. Men so lætt eigur eingin at sleppa. Vit roknaðu við, at ein løgfrøðingur kunnaði seg um málið, áðrenn hann á ljótan hátt niðurgjørdi suðuroyingar. Nei, Halgir, hesin fyrispurningur var ikki ætlaður sum skemt, men var meintur í ramasta álvara.

At ætlanin ikki liggur so langt frá veruleikanum, kunnu niðanfyristandandi dømi tala fyri:

Her eru nøkur dømi:

1) Tá **Komoroyar** – millum Madagaskar og Afrika – loystu frá Fraklandi í 1975, fylgdi syðra helvt ikki við. Á syðru helvt, sum í dag eitur **Mayotté**, er støðan góð. Politiskt er støðan trygt demokrati, eins og tað gongur væl búskaparliga. Hetta kann tíverri ikki sigast at vera støðan á norðaru helvt. Har er skilið vánaligt, diktatur er og búskaparliga eru viðurskifti ring. So ringt er skilið, at íbúgvar á Komoroyum í dag vilja vága nógv fyri at sleppa til syðru helvt.

2) **Arabarar** eru sundur í sera mongum ríkjum.

3) Tá granni okra **Írland** fekk fullveldi í 1923, fylgdi Norðurírland ikki við.

4) Í syðra parti av Afrika var bretska hjálandið **Rhodesia.** Í 1964 loysti norðari partur og fekk navnið **Sambia**. Í 1965 lýsti Ian Smith Suðurrhodesia leyst av Onglandi og stýrdi landinum, til hann fall í 1980, tá landið fekk navnið **Simbabve.** Bæði londini eru í dag sjálvstøðug ríki.

5) Í 1864 tók Týskland í kríggi við Danmark alt hertugadømið **Slesvík**. Í 1920 atkvøddi norðari helmingur seg aftur til Danmarkar.

Í stremban okkara eftir einum samfelag, sum er fyri øll, vóna vit ikki, at fleiri serfrøðingar fara at fylgja í fótasporunum hjá Halgir W. Poulsen, løgfrøðingi.

til Johan Samuelsen:

# Hann, ið ósekur er…

**Manne Persson**

Í bløðunum leygardagin hevði framstandandi javnaðarmaðurin Johan Samuelsen eina áleypandi grein á tjóðveldisfólk. Greinin hevði heitið: Kommunistiskir vegleiðarar — boðar ikki frá góðum.

Greinin hevur tann boðskapin, at fólkini aftanfyri ja-kampanjuna eru kommunistar..

Men Johan, mær vitandi situr bert ein tingmaður í dag, sum sjálvur hevur útnevnt seg sum kommunist. Hesin er javnaðartingmaðurin Hans Pauli Strøm. Tað gjørdi hann m.a. í Framanum nr. 1 í 1979 á aftastu síðu. HPS sat í blaðstjórnini á Framanum. Eftir hvat teir sjálvir søgdu, so var Framin politiskt tíðarrit fyri sosialismu og sjálvstýri, sum føroyskir sosialistar góvu út. Víðari stendur, at :

” Føroyskir sosialistar” virka fyri stovnseting av føroyskum sosialistiskum Tjóðveldi, sum er tann grundvøllur klassaleysa kommunistiska samfelagið skal byggjast á.

Hendan tingmannin halda tit so nógv av, at tit hava sett hann í Uttanlandsnevndina og Grundlógarnevndina. Tvær sera tungar nevndir, sum eftir tínari hugsan ikki skuldi verið heimabeiti hjá slíkum persónum. Eisini hava tit sett HPS at verða hugmyndafrøðiligan eftirlitsmann á Sosialinum (smb. fyrrverandi blaðfólki).

Ein annan av sama slagi hava tit valt tykkum til næstformann í flokkinum. Tí haldi eg, at Johan heldur skuldi óttast sín egna flokk enn Tjóðveldisflokkin.

Vilt tú hava skjalagoymslurnar eystanfyri kannaðar, bið so Hans Paula leggja uppskotið fram.

Ikki tí, eg haldi ikki, at hesir tú fert so illa við Johan, hava roynst samfelagnum so illa. Tað vóru ikki teir, sum rendu samfelagið á heysin. Teir vóru heldur ikki studningsbarónar ella tóku ímóti hundraðtúsundtals skattafríum krónum fyri at verða valdir í suðri og búgva í Havn. Alt í alt hevur hetta verið hampafólk og góðir samfelagsborgarar.

Johan speirekur eisini fylkingina- Fólk fyri friði- , sum eisini hýsti mongum góðum javnaðarmanni. Boðskapur teirra var hin sami, sum stóð á papptallerkunum, sum m.a. Hans Pauli tveitti omanyvir danskar sosialdemokratar í Fólkatinginum á sinni.

Johan sigur eisini: ” Hóast vit øll onnur vistu hvørjir ræðuleikar valdaðu í kommunistisku londunum fyri eystan_..” . Men Johan, tá tit javnaðarmenn vóru vitandi um hetta, hvat gjørdu tit so við tað. Uppsøgdu tit handilsavtalur og fiskivinnuavtalur, ella lótu tit bara standa til?

Nú er Johan ikki hvør sum helst í Javnaðarflokkinum. Hann røkir mong álitisstørv fyri flokkin. Er hetta, hann skrivar menniskjasýnið og tollyndið í flokkinum, so eiga fólk at hugsa seg fleiri ferðir um, áðrenn tey seta krossin 26.mai.

Skrivandi javnaðarfólk eiga at seta sær sjálvum eins hørð krøv, sum teir seta øðrum.

PS: Heldur tú at Hans Pauli hevði fingið visum til USA, nú Grundlógarnevndin fer hagar?